## Víkingabygningur undan kavi á Sandi

Í kirkugarðinum á Sandi eru fornfrøðingar komnir niður á ein áhugaverdan bygning. Eftir tí ið higartil er útgrivið, er bygningurin á leið ferðir metrar til støddar. Møguliga er bygningurin frá tíðliga í víkingaøldini. Símun Arge fornfrøðingur sigur, at hesin bygningur, eins og alt annað, sum higartil er funnið á Sandi, er sera áhugaverdur. Veggirnir eru so at siga órørdir, eldstaðurin sæst tíðuliga og ein góð renna, sum er opin, gongur gjøgnum allan bygningin. Símun Arge heldur at bygningurin er ein arbeiðsbygningur, møguliga ein smiðja. Nógv hitasprongt grót er at finna í einum dunga, beint uttanfyri bygningin, sum eisini styrkir tankan um, at bygningurin er ein arbeiðsbygningur. Í løtuni arbeiða 15 fólk við útgrevsturin, 12 teirra koma úr Bretlandi hini eru føroyingar.



## Virðisløn til Injector

Altjóða felagsskapurin, Sustainable Shipping, hevur kunngjørt, at eitt samtak við Injector Trawldoors A/S og 14 øðrum fyritøkum og stovnum hevur vunnið ársins umhvørvisvirðisløn. Samtakið fær altjóða viðurkenningina fyri felags ætlanina, Framtíðarinnar Grøna Skip. Eitt endamálið við ætlanini hjá Injector Trawldoors A/S og hinum fyritøkunum er at skerja CO2-útlátið frá skipum við 30 prosentum. Eisini fatar ætlanin um at fáa skip at dálka 90 prosent minni við eitt nú køvievni og svávuli.

# Landsstýrismálanevndin dømdi uttan grundarlag

**Hans Trygvi Teirin, advokatur, er sannførdur um, at landsstýrismálanevndin hevur borið seg ivasamt at í málinum um Hans Paula Strøm og meirnýtslu, tá hon uttan at himprast dømir hann sjálv, uttan at nýta nakran óheftan kanningarstjóra. – Tað sær út sum, at rottan er roykt út úr holinum, og við niðurslitnum eygum er komin við einum dómi yvir ein í rúgvuni, sigur hann**




*Tað er ein vika síðan, at Hans Pauli Strøm segði seg úr sessinum sum heilsumálaráðharri. Hans Trygvi Teirin, advokatur, metir, at hann var órættvíst viðfarin*

MEIRNÝTSLA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hóast Anfinn V. Hansen og Bjørn á Heygum, løgfrøðingar, sum vóru við at smíða stýrisskipanarlógina, hava sagt, at landsstýrismálanevndin gjørdi rætt í málinum um Hans Paula Strøm og meirnýtslu, so er Hans Trygvi Teirin, advokatur, sannførdur um, at landsstýrismálanevndin hevur borið seg sera undarliga at í málinum um Hans Paula Strøm.

- Tað eru tvey viðurskifti, eg veruliga undrist á. Tað fyrsta er, at landsstýrismálanevndin ongantíð sjálv hevur tikið málið upp, og nú málið verður tikið upp, er tað eftir eina kæru, frá einumeinstakumtingmanni. Harafturat, er tað bara ein fyribilsniðurstøða, nevndin er komin við, tí Hans Pauli Strøm er bara dømdur av nevndini, hóast nevndin vanliga hevur nýtt kanningarstjóra til mál við minni upphæddum og minni prinsipiellum týdningi, sigur løgfrøðingurin.

Eitt líknandi mál um meirnýtslu var um aldarskifti, tá Signar á Brúnni fór frá sum Mentamálaráðharri. Upphæddirnar vóru ikki so stórar, men kanningarstjóri varð settur.

### Hví ikki aðrar

Løgfrøðingurin metir, at tað sýnist sera undarligt, at ein ávísur landsstýrismaður er tikin burturúr nú, tá tað hevur verið ein generellur trupulleiki hjá teimum flestu.

- Tað er undarligt, at landsstýrismálanevndin ikki av sínum eintingum hevur tikið málið upp, tí tað hevur verið ein trupulleiki leingi. Teir skulu jú sambært stýriskipanarlógini halda eyga við, at landsstýrið ber seg lógliga at, og tað hava teir ikki gjørt. Somuleiðis er tað løgið, at løgtingsins umboðsmaður heldur ikki hevur tikið tað upp. Og tað er eisini undarligt, at tingið ferð eftir ferð hevur góðtikið meirnýtslu, og nú er mann samdur um, at tað ikki ber til hjá Hans Paula Strøm, sigur hann.

### Farin ov langt

Somuleiðis greiðir Hans Trygvi Teirin frá, at landsstýrismálanevndin er farin alt ov langt aftur í tíðina.

-Landsstýrismálanevndin er ein nevnd undir tinginum, og tí kann hon ikki fara aftur um teir roknskapir, sum eru góðkendir av Løgtinginum. So at lasta Hans Paula Strøm fyri 2005 og 2006. Roknskapir, sum longu eru góðkendir, er eitt sindur undarligt, metir hann.

- Tað sær út sum, at rottan er roykt út úr holinum, og við niðurslitnum eygum er komin við einum dómi. Hetta hevur onki við jura at gera. Hetta er reinur politikkur, sigur hann.

### Hinir góðtaka bara

- Anfinn V. Hansen og Bjørn á Heygum hava uttan at himprast staðfest, at Hans Pauli Strøm hevur borið seg ólógliga at, tí teir hava als ikki sett spurnartekin við landsstýrismálanevndina. Tað kann verða, at niðurstøðan er røtt, men tað kunnu vit ikki hava álit á, tí ongin kanningarstjóri er settur og tað bara er nevndin sjálv, sum hevur dømt hann. Hetta hevur verið sera junkasligt úr enda í annan, tá nevndin ikki vil fara eftir nøkrum øðrum enn Hans Paula Strøm og teimum báðum løgmonnunum, heldur Hans Trygvi Teirin.

- Tey skuldu sett ein kanningarstjóra, so vit kunnu fáa staðfest, um tað bara er Hans Pauli Strøm. Um hann hevur ábyrgdina av tí hann skal hava gjørt, ella um ábyrgdin í veruleikanum liggur onkra aðrastaðni.

## Stýrisskipanin um landsstýrismálanevndina

**§ 38.** Løgtingið setur eina tríggja manna nevnd av løgtingsmonnum at hava eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt.

*Stk. 2.* Hevur nevndin illgruna um, at óregluliga hevur verið atborið, kann hon krevja, at løgtingsformaðurin setur ein kanningarstjóra, sum ikki hevur dómsmyndugleika. Hann skal, eftir at hann hevur kannað málið, gera eina frágreiðing til løgtingið, hvørt fyrisitingin í ávísum máli er útint á lógligan hátt. Tveir fimtingar av løgtingsmonnunum kunnu skrivliga seta fram sama krav.

*Stk. 3.* Kanningarstjórin skal hava løgfrøðiligt embætisprógv og skal ikki verða starvsettur í fyrisiting landsstýrisins, á stovni undir landsstýrinum, hjá dómsvaldinum ella fyrr hava viðgjørt málið.

*Stk. 4.* Kanningarstjórin hevur rætt til at krevja skrivligar ella munnligar upplýsingar frá einskildum borgarum eins og frá almennumembætismonnum.